

www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 02 - 2013

# Gassleki á Melkøya-verkinum

Tær seinastu vikurnar hava fólk hjá Statoil arbeitt við ymsum ábótum á tí stóra gassverkinum á Melkøya við Hammerfest, men tá verkið skuldi setast aftur í gongd leygardagin, varnaðust fólk, at tað lak. 32 fólk, sum vóru á verkinum, vórðu flutt í land alt fyri eitt. -Vit hava havt nakrar avbjóðingar við verkinum, síðani tað bleiv tikið í nýtslu, og fyri at fáa tað so trygt sum gjørligt, valdu vit at lata tað aftur í nakrar vikur og at brúka tíðina til neyðugar ábøtur, sigur kunningarstjórin hjá Statoil, Ole Anders Skauby, við tíðindastovuna NTB. Hann leggur afturat, at tað var sjálvandi stak óheppið at fáa ein leka, júst sum ábøturnar vóru lidnar. -Vit royna nú at finna lekan, og tá vit hava staðfest hann, fara vit víðari, sigur Skauby. Hann dugir ikki at siga, nær verkið á Melkøya kann fara í gongd aftur. -Vit mugu fyrst fáa greiði á, hvussu umfatandi lekin er, og hvussu stóra umvæling hann krevur. Ikki fyrr enn tá kenna vit avleiðingarnar, sigur Statoil-kunningarstjórin.